

# Betong skapar eisini bleyt virðir

## Landsverk søkir eftir verkfrøðingi til vegadeildina og verkfrøðingi/ byggifrøðingi til framleiðsludeildina

Hørðu virðini sum vegir, tunlar og brýr eru á mangan hátt ein fyritreyt fyri at kunna røkja bleytu tænasturnar í samfelagnum. Vilt tú útbyggja og viðlíkahalda samfelag okkara á báðum hesum økjum, hevur tú møguleikan nú.

**Høvuðsarbeiðsøkið á vegadeildini**
- seta á stovn og hava dagligu leiðsluna av holdi til viðlíkahald av tunlum og brúm
- seta á stovn og menna eina vælvirkandi viðlíkahaldsskipan til landsvegakervið
- hava dagligu leiðsluna av holdi, sum hevur vegauppmerking um hendi
- luttaka í ráðlegging og gransking á deildini, serliga við atliti at tunlum og brúm

**Høvuðsarbeiðsøkið á framleiðsludeildini**
- gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og anlegsarbeiðum
- skipa fyri viðlíkahaldi av skervverkunum kring landið og asfaltverkinum í Hundsarabotni

**Førleikakrøv**
Starvið á vegadeildini krevur verkfrøðingaprógv, og fyrimunur er at hava royndir á nevndu økjum. Starvið á framleiðsludeildini krevur verkfrøðinga- ella byggifrøðingaprógv. Í báðum størvum verður dentur lagdur á góð samstarvsevni, sjálvstøðugt arbeiðslag, teldukunnleika á brúkarastigi, framfýsni og evni at menna arbeiðsplássið saman við starvsfeløgunum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.



**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella til Landsverk, postsmoga 78, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2008. Merk umsóknina „starv á vegadeild“ ella „starv á framleiðsludeild.“ Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, vegadeildin, tlf. 540 881, he@lv.fo ella til Torkil Olsen, framleiðsludeildin, tlf 540 841, to@lv.fo.

SENDISTOVAN

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*




# Leiðari til Snarskivuna

Søkt verður eftir leiðara til Snarskivuna.

### Snarskivan
Uppgávan hjá Snarskivuni er fyrst og fremst at veita eina góða tænastu til borgarar og starvsfólk. Snarskivan er avgreiðsla hjá fyrisitingunum, tað er Miðfyrisitingin, Tekniska fyrisiting og Trivnaðarfyrisiting. Í Snarskivuni er telefonmóttøka, avgreiðsla, journal, fólkayvirlit, byggitekniska økið og barnaansing.

### Arbeiðsuppgávur
Sum deildarleiðari hevur tú dagligu leiðsluni um hendi. Tín uppgáva er eisini at menna Snarskivuna soleiðis, at Snarskivan fylgir við tíðini og broytist samsvarandi uppgávubroytingini í kommununi. Tín uppgáva er eisini at vera við til at førleikamenna starvsfólkini.

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

### Førleikakrøv
Vit sóknast eftir einum deildarleiðara við viðkomandi útbúgving og royndum.

Góð samskiftisevni og góðir samstarvseginleikar eru ein fortreyt, eins og opinleiki fyri avbjóðingum og nýggjum møguleikum. Eisini er neyðugt við einum motiverandi leiðslustíli.

Vit hugsa okkum at tú dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum og munnliga á enskum, er framsíggin og framsøkin.

### Setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt í 35. lønarflokki sambært Tænastumannaavtaluni (uttan at vera tænastumannastarv) ella sambært avvarðandi sáttmála.

### Umsókn
saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. februar 2008 kl. 15.00. Merkið umsóknina »Deildarleiðari til Snarskivuna«.

### Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, telefon 28 00 20 ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, á telefon 21 03 30.

Tórshavnar kommuna